## Mancini tilboð um United-starv

Italski venjarin, Roberto Mancini, hevur fingið boðið at gera hjálparvenjari hjá Alex Ferguson í Manchester United, men 44 ára gamli Mancini hevur ikki tikið av tilboðnum. Spenningur er um, hvør skal loysa Ferguson av í venjarastarvinum í United, tá ið hann takkar fyri seg, og tilboðið til Mancini er ein ábending um, at hann er í øllum førum upp á tal í enska stórfelagnum.



## Fabregas er til reiðar

Spanski miðvallarspælarin, Cesc Fabregas, er nú til reiðar at spæla fyri Arsenal aftur. Fabregas hevur verið skaddur í fleiri mánaðir, men nú er knæið blivið so gott aftur, at hann er førur fyri at spæla. Sagt verður, at Fabregas verður við í hópinum hjá Arsenal, tá felagið leygardagin skal spæla ímóti Manchester City. Febregas er liðformaður í Arsenal.

# Føroyska ætlanin á Amager kollsigldi

**FC Amager er farið á húsagang. Stóra føroyska ætlanin á Amager fekk ikki neyðugu undirtøkuna, og nú búskaparkreppa fór at gera um seg, stóð felagið ikki til at bjarga**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyska felagið á Amager hevur ikki longur kós ímóti bestu deildini í Danmark. Fíggjarligt ódnarveður hevur gjørt av við FC Amager, og spennandi ætlanin við føroyskum íleggjarum og føroyskum spælarum endar nú við húsagangi.

Síðstu vikurnar hevur FC Amager stríðst fyri at yvirliva. Oddsini vóru ikki tey bestu, og í farnu viku viðurkendi stjórin Todi Jónsson, at nú megnaðu tey akkurát at hanga í við tí uttasta á neglini. Um vikuskiftið misti FC Amager takið, og í dag hevur felagið boðað Sjó- og Handilsrættinum frá, at tað fer á húsagang.

FC Amager, sum er ein samanlegging av feløgum á Amager, fekk ikki ta undirtøku frá vinnulívinum, sum vónað varð, og nú búskaparkreppan eisini fór at gera um seg, var trýstið á FC Amager so stórt, at felagið hóraði ikki undan.

Inntøkur og gjaldføri vóru ikki til staðar til at halda fram, og tað eydnaðist ikki at finna eina loysn á trupulleikunum.

– Sum støðan er blivin, duga vit ikki at síggja, hvussu vit kunnu reka felagið víðari. Vit eru sjálvandi sera kedd av støðuni, og tað er keðiligt, at vit ikki náddu okkara dreymum og visjónum fyri felagið. Eg vil gjarna takka okkara samstarvsfeløgum, stuðlunum og ikki minst teimum trúføstu áskoðarunum, sum hava bakkað okkum væl upp, sigur Todi Jónsson, stjóri í FC Amager.

### Standa uttan felag

Tríggir ungir føroyskir spælarar hava sáttmálar við FC Amager, nú felagið fer á húsagang. Hans Jørgensen av Skála, Páll Klettskarð úr Klaksvík og Erling Jacobsen úr Gøtu hava í sløk tvey ár verið í FC Amager, og síðstu tíðina hava teir fingið alt meira spælitíð á besta liðnum.

Nú standa teir tríggir føroyingarnir uttan felag, og óvist er enn, hvar teir nú fara at spæla fótbólt. Ein møguleiki er at leita heimaftur til Føroya at spæla, men møguliga kunnu teir finna sær nýtt felag í Danmark.

Todi Jónsson hevur verið stjóri í felagnum, men hann kann nú leita sær eftir nýggjum avbjóðingum. – Fyrstu tíðina fari eg at taka mær av løttum, og so má eg umhugsa, hvat eg skal fara í holt við, sigur hann.

Hugaliga ætlanin á FC Amager kundi endað við tí heilt stóra og spennandi fyri føroyskan fótbólt, men tað verður so ikki á hesum sinni, at føroyingar fáa eitt felag í bestu donsku fótbóltsdeildini.

# Sylla stendur á berum

**– Eg vóni at finna eitt felag í Danmark. Eydnast tað ikki, fari eg aftur til Fraklands, sigur Amed Davy Sylla, sum treivst væl í FC Amager og veruliga hevði skotið seg heitan í felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tvey mál í trimum landskappingardystum og fimm mál í sjey venjingardystum. Fyrrverandi ÍF og B36-spælarin, Amed Davy Sylla, hevði veruliga skotið seg heitan í FC Amager, eftir at trupulleikar við arbeiðsloyvi og onkur minni skaði høvdu hildið hann uttan fyri vøllin í longri tíð.

Tískil er hann ógvuliga hugtungur og vónbrotin, nú danska felag hansara er farið á húsagang: – Nú er alt av, staðfestir Amed Davy Sylla, sum var fulltíðaryrkisleikari í FC Amager.

Dysturin ímóti felagnum hjá Christian Høgna Jacobsen, AB, skuldi av røttum verið spældur í gjár, men varð tikin av skránni. Tað sama er venjingin í FC Amager. Hetta kemur at kollvelta gerandisdagin hjá Amed Davy Sylla.

### Vil verða verandi

– Nú vóni eg at finna eitt annað felag í Danmark, sum eg kann spæla fyri. Eydnast tað ikki, gongur leiðin helst aftur til Fraklands, sigur Amed Davy Sylla, sum greiðir frá, at honum dámdi væl í føroyska felagnum á Amager.

– Eg kendi meg væl millum liðfelagarnar. Michael Madsen er ein góður venjari og var leikarunum ein hollur stuðul, sigur Amed Davy Sylla, sum heldur, at næstbesta danska deildin er á nakað hægri stigi, enn besta føroyska fótbóltsdeildin.

– So FC Amager var eitt gott stað hjá mær at menna meg sum fótbóltsleikari, sigur Amed Davy Sylla.

### Fíggjarlig ógóv

Síðstu nógvu vikurnar hevur verið gitt dúgliga um framtíðina hjá FC Amager í donsku miðlunum. Amed Davy Sylla ásannar eisini, at hetta hevur ávirkað leikararnar.

– Sum leikari er trupult at vera heilt fokuseraður á vøllinum, tá tú ikki kennir framtíðarstøðu tína. Kringumstøðurnar hjá liðnum mugu vera góðar og tryggar, um leikararnir skulu kunna geva seg heilt og vera fullkomiliga fokuseraðir. Men tað hevur ikki verið støðan síðstu tíðina, sigur hann.

– Tá venjarin kennir seg noyddan at broyta liðið beint undan dystinum, tí hann ikki vil binda áhugaleikarar at felagnum, um tað fer á húsagang, so slepst ikki undan, at tað ávirkar hópin.

Amed Davy Sylla sipar til dystin ímóti Herfølge herfyri, tá venjarin valdi at síggja burtur frá nøkrum áhugaleikarum, tí brúkti hann hesar í dystinum og FC Amager fór á húsagang, so kundu teir ikki skifta felag, fyrr enn kappingarárið endaði.

### Spennandi felag

Nú er FC Amager farið á húsagang, og Amed Davy Sylla leitar eftir einum nýggjum felag í Danmark. Meðan henda leitan fer fram, kann 26 ára gamli fílabeinsstrandingurin minnast aftur á eina, hóast stutta, spennandi tíð í FC Amager.

– Tað var eitt framsøkið felag. Málsetningarnir vóru stórir og tað merkti eg. Har var tó langt eftir á mál og nógv arbeiðið eftir at gera. Tí var eg eisini fegin um, at alt pappírsarbeiðið við loyvum mínum var komið upp á pláss, og at eg var við at koma fyri meg eftir ein knæskaða, so at eg kundi vera við at hjálpa FC Amager.



*Amed Davy Sylla trívist væl í Keypmannahavn og gongur á málskúla har. Nú vónar hann at finna eitt nýtt felag í Danmark*

*Mynd: Rólant Waag Dam*